# Vakra Eivör bergtók

**Sólin skein sum ongantíð fyrr, tá ið Eivör trein á pall á sandinum leygarkvøldið. Um tað var tí at Eivör fylti ár henda dagin, er ikki gott at vita. Men vit nutu í øllum førum sólina og Eivör, sum báðar tvær høvdu ein sera góðan dag**


Mynd: Sunva E. Lassen

UMMÆLI
*Petur Håberg*
*petur@sosialurin.fo*

Við sær úr Írlandi hevði Eivör stórt sæð somu tónleikarar, ið spæla á nýggju fløgu hennara 'Mannabarn'. Hesir teljast millum bestu av sínum slag, og tað hoyrdist eisini aftur. Sangir sum Myrkurins náði, Dansins Harri og Mannabarn ljóðaðu ótrúliga væl, og at írsku gestirnir kendu sítt tilfar, var eingin ivi um.

Hóast trupulleikar vóru við ljóðinum í fyrstani, so gjørdist tað betri, og ein neyt framførsluna í góðveðrinum.

At Eivör telist millum okkara bestu sangarar varð staðfest so dyggiliga hetta kvøldið. Nýggju løgini eru eitt sindur popput, og á ein ella annan hátt ger hetta, at vakurleikin í hennar rødd kemur enn betri og klárari fram.

Sum hon er von, var hon í spennandi klæðum. Føðingardagsbarnið var í einum sera vøkrum kjóla við stórum, himmalbláum fjaðrum, og var ein sonn fragd at hyggja at.

Hon fortaldi okkum, at hon var rættiliga nervøs, men hetta forðaði henni tó ikki í at syngja sum ein dreymur.

## Tú ert alt

Tað eru nakrir sangir, ið røra hjartað. Sum fara heilt inn um. Og tá er tað líkamikið, um tú ert til harðan rokk, hip-hop ella ball. 'Tú ert alt', sum Eivör sang hetta kvøldið, er ein av teimum.

Tá ið bæði kvinnur og menn standa við tárum í eygunum av einum sangi, sum tey ikki hava hoyrt fyrr, sigur tað meiri enn eitt sindur um, hvussu stórsligið hetta lagið er.

Og uttan at gera av, so var tað sum um øll steðgaðu á og vóru rúnarbundin. Sjálvt tey hálvfullu, sum allarhelst ikki varnaðust at framførslan var byrjað og meiri enn hálvliðin, steðgaðu á og lurtaðu. Eivör sjálv mátti turka tár eftir sangin. Millum stóru løturnar á hesum G!

## Tvær lítlar Eivör

Til at hjálpa sær við lagnum 'Elisabet og Elinborg' fekk Eivör júst hesar báðar; Elisabet og Elinborg, ið eru systrar hennara.

Í hvítum kjóla og grønum hárbandi, komu hesar báðar smædnu og fittu genturnar á pallin og sungu við stórusystur sínari. Og ikki vóru tær einans fittar. Tær dugdu eisini væl at syngja, so kanska fáa vit fáa tvær nýggjar Eivör um nøkur ár. Vit kunnu bara vóna.

# Serena Maneesh bjóðaðu sólini av

**Larmirokkararnir úr Oslo vóru ikki best dámdi bólkur á G!, men tey settu síni spor, og tað vóru fleiri, sum hildu tað vera tað besta besta besta.**

UMMÆLI
*Meinhard Jensen*

Í mun til hvussu fá vit eru, so eru tað fleiri tónleikasløg, sum hava tað nokkso gott í Føroyum. Men eitt rímiliga breitt slag er heimleyst. Tað er noiserokkurin. Tá Glorybox vóru í Føroyum nakrar ferðir fyri fleiri árum síðan, hoyrdu vit ein variant, sum tey kallaðu noisepopp. Hetta ávirkaði Clickhaze eitt sindur, og seinni onkran annan bólk, men tað ávirkaði eisini lurtarar.

Noiserokkur bleiv defineraður tíðliga í 80unum og hevur víst fleiri góð andlit. Eitt upphav var punkurin í 70unum, men Velvet Underground var sanniliga eisini eitt. Serliga teir sangirnir við gittara, sum lá sum eitt tjúkt teppi oman á restini av tónleikinum.

## Ikki poppur

Eg skilji væl Serena Maneesh frontmannin, at hann ikki vil definerast sum bara eitt annað noiserokkorkestur, men hann má skilja tað, at vit hugsa um My Bloody Valentine, Sonic Youth og Velvet Underground og onnur, tá vit hoyra tey. Velvet Underground vóru, líkasum Andy Warhol, sum produseraði fyri tey, popparar innast í steinkenda hjarta teirra. Serena Maneesh royna at finna ein markna, men eftir G!konsertini at døma gera tey onki við at gera tónleikin popputan. Dixie vóru kompromisleysir, men tað haldi eg eisini, at Serena Maneesh vóru. Soleiðis at skilja, at tey justera ikki tónleikin serliga nógv fyri at fáa pengar í lumman.

Serena Maneesh hava sítt egna, men kenslan at hoyra tey minnir um Glorybox, eftirsum vit nú kenna Glorybox so væl (her er bara talan um kensluna av at hoyra. Ikki um tónleikin). Lurta væl, og tú hoyrir sera melodiskan tónleik, men ein larmidýna liggur omaná, og tað er henni, vit royna at balla okkum í. Men tað er ringt at balla seg, tá sólin skínur, og tey so íðiliga arbeiða fyri at fáa tónleikin at sita.

## Kapping við sólina

Konsertin á Syðrugøtusandi var ikki rætta forumið til konsertina, um tað eru umstøður, sum líkjast tónleikinum, tú vilt hava. Teirra tónleikur er ikki milt summarveður og sól og gleði. Men hvat ger tað. Í hesum døgum eigur at bera til at lata sólina ganga á fund við innanduralist.


Mynd: Sunva E. Lassen